# Stubbin

Stubbin byrjaði sítt virksemi í Kvívík fyri tveimum árum síðani. Plássið var tó ikki av tí besta í hølunum í Kvívík, og tí flutti Stubbin til Vestmanna fyri einum ári síðani. Plássið í nýggju hølunum er nógv betri, og á henda hátt hava tey eisini størri úrval á goymslu. Stubbin selur mest bátar, bátaútgerð, kampingvognar og tílíkt, og tað eru Kári Hansen, Ann Wilhelmsdóttir og Remy Hansen, sum arbeiða í fyritøkuni.

Ann Wilhelmsdóttir sigur, at tey hava úr at gera hjá Stubbanum.

- Ja, her er ov mikið at gera. Vit hava rættiliga nógv at gera alt árið, men um summarið er til tíðir ov nógv at gera, so tað kann vera krevjandi.

Hon sigur eisini, at alt fleiri føroyingar keypa kampingvognar.

- Kampingvinnan vindur rættiliga uppá seg í Føroyum. Tað eru alt fleiri, sum keypa kampingvognar, og tey flestu velja at nýta hesar her á landi. Tað vera tó fleiri og fleiri, sum velja at fara uttanlanda við kampingvogni, sigur Ann.

Stubbin selur tó ikki bara bátar, bátaútgerð og kampingvognar. Tey hava eisini vátdraktir, útgerð til vatnítrótt, sleipikrókar, viðfestisvognar og annað. Tey hava snøgt sagt at kalla alt, sum hevur við bátar og kampingvognar at gera.






















